# Yngru lærararnir fyri vanbýti

*Magnus Tausen, lærari í Tórshavnar Kommunuskúla, fílist saman við øðrum lærarum á nýggja tryggingarskipan, ið hevur vakt stóra misnøgd millum lærararnar. Elsa Birgitta Petersen vísir á, at hetta er ein solidarisk skipan, sum er gjørd í røttum fakfelagsanda*

HEINI Í SKORINI & STEFAN Í SKORINI

Lærararafelagið hevur seinastu 20 árini havt eina trygging, ið hevur virkað á tann hátt, at um tú doyrt, fáa tey avvarðandi eitt ávíst útgjald, og tað útgjaldið er so minkað, jú eldri ein verður. Tað vil við øðrum orðum siga, at um ein ungur lærari doyr, fáa tey avvarðandi eitt stórt útgjald. Tá tú so ert 67 ára gamal, fellur tú náttúrliga úr skipanini, og tá ert tú ikki tryggjaður meir.

Nú hevur Lærarafelagið gjørt eina nýggja skipan, tí eftir teirra tykki var hin ikki nóg tíðarhóskandi. Nýggja skipanin ber í sær, at útgoldnu upphæddirnar eru nógv størri. Tað vil siga, at doyrt tú, áðrenn tú ert 44 ár, fáa tey avvarðandi 500.000 kr, ert tú millum 45 og 55 ár, lækkar upphæddin niður í 300.000 kr, og hetta stendur við, til tú ert 67 ára gamal. Tá tú so sum lærari ert vorðin 67 ára gamal, fært tú eitt útgjald, sum ljóðar uppá 100.000 kr.

Tað, sum nú hevur vakt ans og hevur elvt til stóra misnøgd hjá lærarunum, er, at um vit siga, at ein lærari er 66 ár og níggju mánaðir gamal, er hann við í hesi skipan í tríggjar mánaðir, og fær hann síðani 100.000 kr. í hondina. Ein 25 ára gamal lærari kann harafturímóti seta peningin, hann rindar til hesa skipan, inn á bók og síðani hava 300.000 kr., tá hann er 67 ára gamal.



*Elsa Birgitta Petersen tekur ikki undir við teimum atfinningum, sum Magnus Tausen og aðrir lærarar hava ført fram um nýggju samlagstryggingina*

Skipanin er tí sambært Magnusi Tausen sera órættvís, við tað at ungu lærararnir rinda pening til eldru lærararnar. Tað halda Magnus Tausen og aðrir lærarar ikki er heilt rætt, við tað at tað gerst sera ójavnt býtt millum lærararnar, alt eftir hvønn aldursbólk teir hoyra til.

– Summi gjalda einki og fáa alt, meðan onnur gjalda alt og fáa einki, sigur Magnus Tausen við Sosialin, og tað er í roynd og veru har, ónøgdin hjá lærarunum liggur.

Lærararnir gjalda yvir 300 kr. um mánaðin til nýggju tryggingina. Ein helvt fer til upphæddina, sum tey avvarandi fáa, um teir doyggja, meðan hin helvtin fer til hesar 100.000 kr.

– Rokna vit eitt sindur, rindar ein 25 ára gamal lærari 300.000 kr., til hann er 67 ára gamal og fær 100.000 kr. aftur, meðan ein lærari, sum júst er vorðin 66 ára gamal, rindar umleið 3600 kr. og fær 100.000 kr útaftur. So skeiv er myndin í veruleikanum, sigur Magnus Tausen við Sosialin.

### Hava sett spurningar

Spurdur hvat hann og aðrir ónøgdir lærarar, ætla at gera við málið, sigur Magnus, at tey hava sett nevndini í Lærarafelagnum nakrar spurningar, sum tey vóna, at nevndin kann svara teimum uppá. Síðani ætla tey sær víðari við hesum máli.

– Vit ætla at fáa eitt kjak í lag inni á internet-heimasíðuni hjá KT deplinum (www.skulin.fo.), har vit vónandi eisini fáa nevndina í Lærarafelagnum uppí, sigur Magnus Tausen. Hann sigur víðari, at tey hava kannað nøkur ting viðvíkjandi bæði trygging og uppsparingum, og niðurstøðan er, at nevndin er farin fullkomiliga skeiv í hesum máli.

Tað, sum Magnus eisini fílist á, er hátturin, sum nýttur varð, tá skipanin kom í gildi.

– Á aðalfundi í juni mánaði varð hetta uppskot lagt fram, uttan at limirnir í veruleikanum vistu, hvat skipanin innibar. Síðani atkvøddu øll fyri broytingini, og nú kemur til sjóndar, hvat hetta veruliga er.

Magnus sigur eisini, at hetta er eitt alt ov stórt mál at taka støðu til eftir bara at hava fingið nakrar fáar upplýsingar á einum aðalfundi. Kunningin hevur stutt sagt ikki verið nóg góð eftir tykki Magnusar.

Ynskið er, at skipanin við teimum 100.000 krónunum snøgt sagt fall burtur, meðan ein sjálvur ger av, um hann vil spara upp ella ikki.

Skipanin kann tó ikki broytast uttan nýggjan aðalfund.

### Solidarisk skipan

Elsa Birgitta Petersen, formaður í Føroya Lærarafelag, heldur ikki, at atfinningarnar hjá teimum ónøgdu lærarunum eru heilt í lagi.

– Vit hava havt eina trygging síðan 1980, men vit hildu, at tíðin var komin at dagføra hana. Hesum hava vit so arbeitt við í eitt hálvt ár, og á aðalfundi 17. juli í ár, var hon einmælt samtykt, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Hon er ikki samd í teimum, sum føra fram, at skipanin er órættvís, men heldur, at hetta er ein góð trygging.

– Hetta er ein solidarisk trygging, sum er gjørd í røttum fakfelagsanda. Hetta er tann sama solidariska skipanin, sum vit hava havt alla tíðina. Allir 750 limirnir verða tryggjaðir uttan mun til, hvør heilsustøða teirra er, sigur Elsa Birgitta.

Lærarafelagið hevur eisini sett eina undirnevnd at viðgera nýggju tryggingina, nú lærarar hava gjørt vart við sína ónøgd. Eisini vísir hon aftur, at lærararnir hava verið ov illa kunnaðir um málið.

– Vit hava havt eina frágreiðing í Skúlablaðnum um ársskiftið, og eisini varð kunnað um málið á aðalfundinum. Uppskotið varð einmælt samtykt, leggur hon dent á, og Lærarafelagið skal halda seg til eina samtykt, sigur formaðurin í Lærarafelagnum.

So er spurningurin, hvat undirnevndin kemur fram til í síni viðgerð av málinum, men aðalfundurin skal góðkenna eina broyting.

# Burðaravlopið ongantíð so lítið síðan 1990

*Burðaravlopið í 1999 var 251. Hetta talið hevur ikki verið so lágt í minsta lagi tíggju ár. Fleiri fosturtøkur eru framdar í ár samanborið við tvey tey undanfarnu árini*

STEFAN Í SKORINI

Burðaravlopið er talið av teimum, sum eru fødd á lívi minus deyð. Í 1999 vórðu 632 fødd á lívi, meðan 381 fóru hiðani. Hetta gevur eitt burðaravlop, sum er 251.

Hetta tal hevur ikki verið so lágt í minsta lagi tíggju ár. Hagtølini í heilsulagslýsingini hjá landslæknanum fyri1999 eru aftur til 1990. Tá var burðaravlopið heilt uppi á 596, og í fjør var tað tvær ferðir so lítið.

Síðani 1990 er burðaravlopið minkað støðugt ár undan ári. Bara í 1997 var burðaravlopið størri enn árið fyri.

Í mun til undanfarin ár eru ikki nógv børn fødd í ár. Talið av føddum á lívi er eisini minkað tey seinastu fýra árini. Í 1996 vóru tey 695 í tali, í 1997 vóru 676, í 1998 vóru 641 og í fjør vóru 632 børn fødd á lívi.

Síðan 1996 eru 661 børn fødd í miðal um árið. Um hugt verður at miðaltalinum í fimm ára skeiðum síðan 1965, so hevur miðaltalið ongantíð verið so lágt sum nú. Hægst var miðaltalið í tíðarskeiðnum 1965-70. Tá vórðu 892 børn fødd í miðal um árið.

Talið av deyðføddum børnum var 6 í 1999. Tríggir dreingir og tríggjar gentur. Tá 632 børn vórðu fødd á lívi, er deyðstíttleikin 9,5 promillu. Í 1995 var deyðstíttleikin 9,2 promillu, meðan hini árini í nítiárunum hevur hann ligið ímillum 1,1 promillu í 1990 og 6,2 promillu í 1998. Eitt barn doyði innan ta fyrstu livivikuna í fjør.

Føðifráboðanirnar siga, at jarðarmøðurnar í 1999 høvdu 620 føðandi kvinnur, sum fingu 638 børn, harav seks deyðfødd.

Av teimum 632 børnunum vórðu 316 teirra fødd uttanfyri hjúnalag, t.v.s. 50 prosent. Hetta talið var í 1990 42,5 prosent. Síðani er prosenttalið hækkað seinastu árini. Um havt verður í huga, at veruliga talið av føddum børnum er lækkað samstundis, er veruliga talið av børnum, sum eru fødd uttanfyri hjúnalag nøkulunda tað sama ella minni.

Lógin um fosturtøku er ikki broytt síðan 1959 í Føroyum. Í lógini stendur, at ein sjúkrahúslækni kann taka avgerð um fosturtøku, um tað stendur um lív ella heilsu hjá kvinnuni. Um fosturtøka skal fremjast av øðrum orsøkum, skulu tveir læknar taka avgerð um hetta.

Sambært upplýsingum frá sjúkrahúsunum vórðu í fjør 48 fosturtøkur framdar í Føroyum. Ein á Suðuroyar Sjúkrahúsi og hinar 47 á Landssjúkrahúsinum. Hetta eru tríggjar fleiri enn í 1998 og 26 fleiri enn í 1997.

Í 1990 var talið av fosturtøkum 81. Síðani hava fosturtøkurnar verið færri fram til 1998, tá ein hækking aftur varð at síggja. Annars kann nevnast, at nógv tær flestu fosturtøkurnar eru framdar á Landssjúkrahúsinum í Havn. Í Klaksvík eru bara tríggjar fosturtøkur framdar tey seinastu tíggu árini, og eingin síðan 1993.



DAGFØR
TEG
sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

# Trygdarbelti kann bjarga lívi

*Í frágreiðingini hjá landslæknanum verður sligið fast, at trygdarbelti hevði bjargað lívinum hjá helvtini teimum, sum hava latið lív í ferðsluni tey seinastu 14 árini*

Stefan í Skorini

Síðan 1886 eru 43 fólk deyð í ferðsluni í Føroyum. Av teimum nýttu 36 ikki trygdarbelti ella fallhjálm, tá vanlukkan hendi. Landslæknin slær fast, at helvtin av teimum 36 høvdu komið frá vanlukkuni við lívinum, hevði trygdarbelti verið nýtt.

Í hesum 14 ára tíðarskeiðnum hevði nýtslan av trygdarbelti kunnað bjargað 18 persónum, og tey flestu av teimum heilt ung fólk.

Tí verður heitt á allar førarar og ferðandi við motorakførum um at nýta trygdarbeltið í øllum førum. Trygdarbeltið kann vera munurin á lívi og deyða.

í 1999 lótu 14 fólk lív í óhappum, harav sjey í ferðsluni. Hetta talið er stórt samanborið við 1998, tá seks fólk doyðu í óhappi, harav eitt í ferðsluni.

1000
orsøkir at ferðast við MAERSK AIR



**1000 kr. av vanliga APEX-prísinum**

Frá 23. oktober til og við 10. desember 2000 ber til at ferðast bíliga til og úr Føroyum. Forsølan er frá 16. oktober til 3. desember 2000. Treytin er at tvey ferðast saman. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

**Føroyar - Danmark**
**(Keypmannahavn ella Billund)**
**ella**
**Danmark - Føroyar**
**og aftur 1)**

Fyri hvønn
**1500,-**
+ ferðaavgjøld

**Børn 0-2 ár: -90% og 2-11 ár: -50%**

*1) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag. Ferðin kann í mesta lagi vara 1 mánað. Minst tvey skulu ferðast saman. Ferðaavgjaldið til Keypmannahavnar og aftur er 335,- kr. og til Billund og aftur 378,- kr. fyri hvønn. EuroBonus.*

**Haldið jól í Danmark við MAERSK AIR**

Frá 8. desember 2000 til og við 7. januar 2001 ber til at ferðast bíliga til Danmarkar og aftur. Forsølan er frá 1. november til 11. desember 2000. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

**Føroyar - Danmark**
**(Keypmannahavn ella Billund)**
**og aftur 2)**

Fyri hvønn
**1250,-**
+ ferðaavgjøld

**Børn 0-2 ár: -90% og 2-11 ár: -50%**

*2) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðin skal vara millum 7 og 21 dagar. Ferðaavgjaldið til Keypmannahavnar og aftur er 335,- kr. og til Billund og aftur 378,- kr. fyri hvønn. EuroBonus.*

MAERSK AIR